# Ein ferðaupppliving

Eg fari at siga frá einum longdum vikuskifti í Keypmannahavn tíðliga á vári 2007 frá hósmorgun til sunnudag seinnapart. Eg fór partvíst við yngstu systir mínari, sum skuldi til ein sertannlækna, og partvíst, tí eg skuldi avheinta nakrar vørur, ið eg hevði keypt. Eg tók seks ára gamla sonin við, tí eg visti, at summarið kom at vera rættiliga tengt av arbeiði, og so hevði hann um ikki annað verið uttanlands í ár og upplivað eitt sindur. Eg ætlaði, at hann skuldi sleppa bæði í Zoo og Tivoli.

Eg og systir mín eru eitt sindur bangnar fyri at flúgva, so tá ið veðrið var bæði grátt og regntungt henda dagin, vit skuldu avstað, dámdi okkum hetta einki serligt. Flúgvarin fór eisini dundrandi og skinklandi skrátt upp í loft á ein slíkan ófantaligan og ótespiligan hátt, at eg bæði tá og í dag eri sannførd um, at tað var ein nýbyrjari, ið sat við stýripinnin. At síggja bleika andlitið á systir mínari, gjørdi ikki støðuna betur og ei heldur, tá ið hon spurdi: “Eigur tað (*flogfarið*) at ljóða so?” Hóast eg sat við flákrandi summarfuglum í búkinum og angraði, at eg nakrantið var farin umborð, so vissaði eg hana um, at hettar var vanligt. Gott at hon ikki er tankalesari. Men vit komu upp í øllum góðum og lendu eisini i øllum góðum í Kastrup.

Vit høvdu bílagt dupultkamar við uppreiðing á einum motelli tætt við lufthavnina. Tá ið vit komu hagar, var trupulleikin bert tann, at har vóru eini 5-6 trapputrin upp til inngongdina, so eg, sum altíð havi eitt risastórt kuffert við av gomlum vana, mátti hava hjálp til at fáa kuffertið upp ígjøgnum trappurnar, hóast hjul vóru undir ... kuffertinum, meini eg. Ná, men vit skrivaðu okkum inn, og tað tók sína tíð. Tvær ungar gentur stóðu aftan fyri diskin. Tá ið umleið einir 45-60 min. vóru farnir, fingu vit endiliga lykilin og kundu fara inn á kamarið.

Kamarið var deiligt og nossligt, men tíverri lá tað á stovuhædd beint við inngongdina og við vindeyganum út ímóti parkeringarplássinum. Vit sóu í andanum, hvussu vit fóru at vera órógvaðar av klamsandi hurðum og bilhurri allar tíðir á døgninum. Vit gjørdu tí av at biðja um eitt annað kamar, ið lá meira avsíðis. Eg haldi ikki, at kamarskiftið hevur hóvað gentuni aftan fyri diskin. Í hvussu er fingu vit nú eitt kamar, sum lugtaði av sigarettosi (*tað var eitt ikki-roykjara motell*) og sá rættiliga brúkt og slitið út samanborið við hitt fyrra. Og baðirúmið ... ja, tað var veruliga eitt kapittul fyri seg. Um ein ikki hevði “klaustrofobi” áðrenn, so kundi ein lættliga fáa tað hetta longda vikuskiftið.

Eg haldi ikki, at tann, ið bygdi motellið, hevði tikið hædd fyri, at ikki ein og hvør kundi nýta hetta baðirúmið. Ímyndað tær eitt stóran prúðan mann við búkmiklari framsíðu og einari vektnál, ið vísir skeivu meðina 100, ið skal inn á slíkt baðirúm. Eitt baðirúm, ið er tepran metur til breiddar og teprar tveir metrar til longdar ... tað er nakað, ið gevur einum nakað at hugsa um. Hann hevði fyrst verið noyddur at skora seg eftir liðini inn í hetta lítla baðirúmið og síðan antin staðið ella sitið á skák fyri at kunna verið har inni. Ímyndað tær framhaldandi, at í øðrum endanum stendur eitt vask við við einari brúsu og einum spegli uppi yvir. Í hinum endanum stendur ein kumma. Av hesum kann ein skjótt rokna út, at tað, ið eftir er av gólvplássi og rúmd, ikki er nakað, ið ger tað stóra afturljóðið. Tvørturímóti. Hevði viðkomandi kallkyn síðan verið so óheppin at staðið fastur, so hevði eitthvørt róp um hjálp verið fullkomuliga køvt av iltmangul.

Á vegginum uppi yvir kummuni var ein glashill, ið skuldi eitast at vera til toilettlutir, men tann, ið hevði sett hana upp, má hava misskilt tyngdarlógina. Glashillin bendi eitt ánilsi niðureftir, soleiðis, at setti tú tannbust, tannkrem í plastikkrússið ella nakað annað á hillina, so hevði tað skreitt so beint niður í kummuna. Men sum *Monthy Pyton* syngur: *“Always look on the bright sight of life...”*. So eg og systir mín høvdu stóran stuttleika av hesum rættiliga sermerkta baðirúminum, har vit m.a. máttu ansað okkum fyri brúsini, tá ið vit bustaðu tenn, soleiðis, at hon ikki datt niður í nakkan á okkum.

Kortini, vit upplivdu mangt annað fyriuttan hetta serliga baðirúmið, ið enn er prentað fast í minni mínum sum við trýtumma seymi. Eg hevið ikki eitt risastórt kuffert við til einkis, so vit fóru í móttøkuna fyri at vera kunnaðar um, hvar tokstøðin var, tí vit ætlaðu okkum longu nú tann fyrsta

Copyright Turið Christiansen

dagin ein túr út í ta stóru sølumiðstøðuna Field´s, sum lá tætt við. Á tokstøðini stóðu vit eina góða og langa løtu og fanglaðust við ein sera treiskan ferðaseðla-automat, sum einki vildi hava við pengarnr hjá okkum at gera (*hóast eg og systir mín eru hálvir danskarir, og sonur mín enntá er ¾ danskari*). Har var einki at gera, so eg mátti lokka hann (*automatin*) við kortinum hjá mær. Jú, tá bar til ... vit fingu langt um leingi ferðaseðlarnar og stóðu so við einum tokkorti frá móttøkuni og einari toktímatalvu, sum vit royndu at týða. Tað var rákalt og skýmligt í undirgrundarbreytini, og vit bíðaðu leingi, til vit vóru vissar í, at tað var tað rætta tokið vit fóru við. Á Field´s fingu okkara ótolnu kvinnuligu "shoppe-gen" rættiliga gjørt um seg. Eg hevði skrivað mær ein lista heimanífrá, hvat eg skuldi keypa av ymiskum. Men "*shoppe-genið*" tók uttan víðari yvir, so listin bleiv væl longri enn upprunaliga ætlað.

Næsta dagin skuldi systir mín til sertannlækna inni í miðbýnum í Keypmannahavn, har hon hevði fingið eina tíð fyrrapart. Vit høvdu sett kross á gøtuna á kortinum yvir Keypmannahavn, har hesin vælsignaði tannlækni helt til. Hesa ferð gekk upp á stás við ferðaseðla-automatinum, sum vit vóru blivnar heilt væl við ... ivaleyst, tí vit fóðraðu hann rættiliga væl. Komnar inn til miðbýin royndu vit at peila av, hvønn veg vit skuldu fara. Vit høvdu nøkur lyklapunkt, eitt nú sjálvan Høvuðsbanagarðin og Tivoli, ið lá beint yvirav. Tá ið vit hildu, at vit høvdu funnið tann rætta vegin, fóru vit gearandi avstað, bara fyri at varnast, tá ið vit høvdu gingið eina góða løtu, at vit vóru farnar skeivan veg ... vit skuldu fara beint øvutan veg. Vit vendu so við, meðan vit tíðum hugdu eftir kortinum og kjakaðust um, hvørja leið vit skuldu halda.

Vit endaðu so við ein síðuveg, sum vit ikki sóu á kortinum. Eg steðgaði einari eldri konu fyri at fáa meira nágreiniliga hjálp, enn kortið kundi geva okkum. Hon ivaðist eisini í, hvørja leið vit skuldu halda, og visti nóg illa skil á gøtunøvnunum, vísti tað seg. Hon steðgaði einari yngri kvinnu, ið kom framvið. Og har stóðu so tveir rótdanskarar, ið búðu meiri ella minni á staðnum, tveir hálvir danskarar og ein ¾ danskari (*sum var yngst og eitt sindur uttanfyri alt kjakið*), og royndu at finna veg. Í felag vóru vit samdar um, at tað mátti vera ein høvuðsvegur, sum gekk javnfjarur við ta lítlu síðugøtuna. Vit takkaðu fyri hjálpina, hóast vit hildu tað vera nógv fyri, ikki at kenna býin hjá sær betur enn so.

Tann ásetta tíðin, ið systir mín skuldi møta, nærkaðist alt meira, og nú byrjaðu vit at gerast eitt sindur fjálturstungdar. Vit fóru aftur gearandi avstað eftir tí vegnum, ið, vit vóru komnar ásamt um við damurnar, mátti vera tann rætti. Vit vóru tó ikki meira sannførdar enn so, at vit steðgaðu einum ungum manni á leiðini fyri at vissa okkum um, at vit veruliga vóru á røttu leið. Jú, tað vóru vit ... tíbetur, tí nú høvdu vit ikki nógva tíð eftir at geva av. Og lukkutíð komu vit í øllum góðum til adressuna og kundu slappa av aftan á ein rættiligan uppskakandi fyrrapart.

Tað, ið eftir var av degnum, gekk rættiliga friðarliga fyri seg og uttan tað stóra rumblið. Vit komu í Zoo, sum ætlað, til stóra gleði fyri bæði okkum stóru og tann lítla. Seinni út á seinnapartin avheintaði eg vørurnar hjá umboðsseljaranum og fekk samstundis eisini høvi at heilsa upp á hana og hini í fyritøkuni.

Tann triðja dagin byrjaðu vit við at eta brunsj inni í miðbýnum. Spyr meg ikki hví, men vit brúktu eina ótrúðliga tíð at finna akkurát tí røttu kaffi-/matstovuna, ið hevði tað, sum vit vildu hava. Vit fóru inn á fleiri, bæði tær, sum lóðu beint við gongugøtuna, og aðrar, sum lóðu á síðugøtunum. Men einki sýntist at vera nóg gott til okkara kræsnu gómar. Sonurin hjá mær var farin at ótolnast, tí nú var hann svangur og ivaleyst eisini rættiliga troyttur av hesum fjasutu konufólkunum. Vit valdu okkum at enda eina griska kaffi-/matstovu og valdu at seta okkum uttanfyri, tí veðrið var so deiligt. Hóast sólin skein, vísti tað seg at verða nakað kaldligt í longdini. Vit mugu hava sæð nakað beinfrystar út, tí eitt av starvsfólkunum, ein eldri rættiliga sjarmerandi grikki ... ja, teir vita, hvussu teir skulu fara við damunum ... kom við teppum til okkum øll trý. Ja, tað kann ein kalla tænastu. So vit fóru vælnøgd avstað, tá ið vit høvdu fylt okkum búkarnar.

Síðani gjørdu eg og systir mín rokinnkeyp í Hennes & Mauritz, tí tey kvinnuligu "*shoppi-genini*" høvdu gingið og ótolnast líka síðani tíðliga á morgni at sleppa til verka. So har varð keypt inn fyri allar pengarnar, klæðir, belti, taska ... you name it. Hetta var ikki akkurát nakað, sum segði lítla soni mínum so nógv, so hann júkaði um, nær vit fóru í Tivoli. Eg royndi at fáa hann at halda út. Hann kemur at uppliva mangt slíkt seinni í lívinum við einari framtíðar damu/konu. Og nú skulu tit

Copyright Ingun Christensen

ikki halda, at hann varð við sviðusoð, hóast tað kann tykjast soleiðis. Nei, hann fekk so sanniliga sín part nøktaðan. Vit vóru m.a. inni í BR og luftaðu okkum pengapungin, og harafturat heilsaði hann upp á Fætter BR, sum gav honum eitt ordans klemm mitt á gongugøtuni. Eg fekk eisini tikið mynd av teimum báðum, har teir standa so fittir ... eg mangli bara at framkalla myndina. Ná, men fyri at venda aftur til Hennes & Maurtz, tá ið vit endiliga høvdu fingið tømt ein part av klæðnahandlinum, stóðu vit ótolnar í einari kilometur langari røð saman við øðrum "*shoppi-genum*". Og so endiliga, til stóra gleði fyri ein vissan lítlan harra, kundu vit fara í Tivoli.

Tað eru nøkur ár síðani eg havi verið í Tivoli í Keypmannahavn, og minni er í summum føri stutt. So tað fyrsta, sonur mín fekk lokkað meg í, var rusjibanan. Tað var, fyri at siga sum er, ein ræðulig og ótespilig ferð, ið fekk innvølin at venda sær og lunguni at víðka seg, so at andskræmilig skríggj sum av sær sjálvum funnu veg upp ígjøgnum hálsin og út í tað súsandi luftina. Eg segði tí eisini bums nei, tá ið hann ætlaði, at vit skuldu fara upp í rusjibanan eina ferð afturat. Annars, so fingu vit roynt tað mesta, ið var til hansara aldursmark. Aftan á eina góða máltið setti vit okkum at hyggja at pantomime-leiki á tí uttandura pallinum. Tað var rættiliga stuttligt og áhugavert. Men tá ið vit høvdu sitið har eina góða løtu, bleiv ein øgilig málageipan aftan fyri okkum. Tá vísti tað seg, at ein fullur ungur maður, sum vaktirnar fyrr um kvøldið høvdu blakað út, tí hann gjørdi ónáðir, hevði sníkt seg inn aftur. So vaktir komu rennandi og rópandi úr øllum ættum eftir hesum unga manninum, ið rann undan. So knappliga sótu vit, áskoðarnir, við nakkunum vendum ímóti pallinum, tí at tað, sum hendi uttanfyri, var nógv meira spennandi. Ja, sonurin hjá mær mundi ikki komið yvir hettar og tosaði ikki um annað, tað ið eftir var av kvøldinum.

Eg og systir mín vóru nú vorðnar rættiliga vandar við at nýta bæði tok og buss, so vit skuldu sjálvandi taka tok heim aftur hetta kvøldið. Tað var vorðið eitt sindur seint og skýmligt. Vit kannaðu aftur tímatalvuna og hildu so oman eftir einari av trappunum til tokbreytina at bíða. Meðan vit soleiðis standa, fara vit at kjakast, um vit nú veruliga standa við ta røttu breytina. So síggja vit eitt tok á einari aðrari breyt hinumeðin, har fólk eru við at fara uppí. Systir mín er sannførd um, at hatta er tokið, vit skulu við, og at vit standa við ta skeivu breytina. So fóru vit við hjartabankan stórleypandi við taskum og posum frá Hennes & Mauritz upp á sleip upp gjøgnum trappurnar. Niður gjøgnum aðrar trappur til ta røttu tokbreytina, og ... náddu tað akkurát. Puha ... kláraðu tað aftur enn eina ferð!!!

Fjórða dagin, var dagurin, ið vit skuldu heim aftur við Atlantic Airways. Vit fingu alt viðførið innskrivað í øllum góðum. Og glað var eg, at eg hevði tikið risastóra kuffertið hjá mær við, tí tað var stúvstappað. Vit skuldu so ígjøgnum trygdareftirlitið. Eg og sonur mín sluppu ígjøgnum uttan nakað hóvasták. Verri var við systir mínari.

Fyrst mátti hon ígjøgnum eina nágreiniliga kanning, tí tevjarin fór at ýla, tá ið hon skuldi ígjøgnum. Síðan var taskan hjá henni gjøgnumrótað og funnin ov tung. Linsuvætan fekk ikki loyvið at koma við, og fleiri aðrar glaskrukkur við vætu skuldu í plastikposar. Eg gjørdist eitt sindur gruggut við tann kvinnuliga trygdarvørin um hesa dýru rættiliga týdningarmiklu linsuvætuna. Tað endaði við, at systir mín so fekk loyvi, at fara oman í innskrivingarhøllina at koyra linsuvætuna í viðførið har. Síðan skuldi hon taka nakrar plastikposar uppaftur við sær, um hon skuldu geva sær vónir um at fáa glaskrukkurnar við.

Systir mín kom tivandi uppaftur, mátti aftur ígjøgnum tevjaran og kannast, fyri bert at fáa at vita frá kvinnuliga trygdarvørinum, at hon hevði tikið teir skeivu plastikposarnar við sær. Aftur mátti hon oman í innskrivingarhøllina. Algoyst uppafturkomin, mátti hon fyri triðju ferð innanfyri henda eina tíman enn eina ferð ígjøgnum tevjaran, aftur kannast fyri triðju ferð av tí sama mannliga trygdarvørinum, sum helt fyri, um hon ætlaði sær at renna soleiðis aftur og fram allan dagin. Hon fekk glaskrukkurnar í teir røttu posarnar. Tann kvinnuligi trygdarvørurin var langt um leingi nøgd, og vit sluppu øll trý langt um leingi úr tollinum.

"*Shoppi-genini*" skuldu sjálvandi líka nøktast, áðrenn vit sluppu landjørðini, so vit fóru inn i ein tax-free handil við luktilsi, kremum o.ø. Vit høvdu lovað mammu okkara at keypa eitt ávíst luktilsi. Tað vísti seg, at tey høvdu tað ikki til sølu. So vit royndu at finna okkurt annað í staðin og tevjaðu okkum gjøgnum fleiri onnur sløg. Í mínum íðni kom eg at stoyta nær um helvtina av einum glasi



Copyright TrygvChristensen

oman yvir meg, so eg angaði sum eitt heilt parfumarí, tá ið vit fóru svingandi við innkeypsvogninum út úr handlinum aftur.

So vóru vit endiliga umborð á Atlantic Airways flogfarinum á veg til Føroyar. Vit vórðu ávaraði áðrenn fráferð, at hóast tað var stilli, so var so mikið tjúkt í mjørka í Føroyum, at ivasamt var, um tað fór at eydnast at lenda, men flogskiparnir vildu gera eina roynd. Vit sveimaðu eina góða løtu uppi yvir Vágunum, men mjørkin var ikki sinnaður at flyta seg ein tumma. Vit máttu sostatt venda við aftur til Bergen, til líkindini vóru vorðin betur. Har sótu vit so í tímar, meðan sonurin fekk gagnnýtt tíðina við at keypa sær tvey leikuflogfør og annað við.

Um nátturðatíð fingu vit boð um, at ferðafólkini kundu fara upp í matstovuna at keypa sær mat fyri 100 kr. pr. persón, sum Atlantic Airways skuldi rinda – alt yvir hesa upphædd, mátti ein gjalda úr egnum lumma. Hettar fekk fleiri av ferðafólkunum at ilskast um, hvussu smálig tey vóru á Atlantic Airways, og at eingin kundi eta seg mettan fyri bert 100 krónur. Meðan vit øll sótu og nutu tann smáliga matin frá Atlantic Airways, fingu vit boð um, at flogfarið hjá Atlantic vildi gera enn eina roynd at lenda í Vágunum.

Vit fóru øll tuskandi avstað og máttu fyri aðru ferð hendan dagin ígjøgnum trygdareftirlitið ... uttan systir mín. Hon skuldi fyri fjórðu ferð ígjøgnum og hevði uttan ivað rekordina henda dagin. Og tað má sigast, at hesa ferð hevndi lagnan seg so dyggiliga inn á meg. Systir mín og sonurin fóru drønandi ígjøgnum sum einki, meðan eg mátti bæði úr frakka, belti og skóm ... ja, tað manglaði bara, at eg var biðin um at strippa. Eg stóð har og gleivaði og kendi meg næstan sum ein brotsmann. Fekk næstan ringa samvitsku, meðan eg bleiv kannað í enda í annan. Taskan varð gjøgnumrótað. Mær dámdi einki, tí flogfarið fór skjótt avstað, og har stóð eg og mundi ikki sloppið frá hesum bítska norska kvinnuliga trygdarvørinum.

Tá ið eg og sonurin endiliga sluppu avstað, vóru næstan øll hini ferðafólkini farin ... somuleiðis systir mín. Eg og ein onnur føroysk kona, sum sýntist at mangla jarðarsamband, stóðu har og hugdu hvør upp á aðra og vistu ikki, hvørja leið vit skuldu halda. At enda fekk eg fatur á einum starvsfólki, sum kundi siga mær, hvønn veg vit skuldu fara. Tá ið vit komu stunandi út ígjøgnum tax-free handilin, stóðu øll ferðafólkini á rað, klár at fara umborð. Systir mín var glað at síggja okkum, tí hon hevði gingið bangin og bíða, tí vit komu ikki vegin fram.

Vit lendu lukkutíð í Vágunum í øllum góðum. Móð og troytt, aftan á eitt stutt, men hendingaríkt vikuskiftið í Keypmannahavn ... og einari millumlending í Bergen.

***©Ingun Christensen, heystið 2007***

Copyright Ingun Christensen